**VIÐMERKINGAR**

# Opið bræv til Mentamálaráðið

**Bergur Djurhuus Hansen**
*lærararáðsformaður*

Lærararáðið á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði mótmælir avgerðini hjá Mentamálaráðnum (MMR) at taka ein málsligan fyrsta studentsflokk av.

Fyri at skilja, hvussu álvarsligt hetta er, eigur at havast í huga, at flokkurin er karmur um gerandisdagin hjá næmingunum. Flokkurin er tað sosiala rúmið, har álit og tryggleiki borga fyri einum góðum lívs- og arbeiðisumhvørvi.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið hevur flokkin sum sjálvstøðuga eind. Við tað, at tað bert eru rammulógir fyri fakligt innihald, og metodufrælsi ræður, kann tað, ið gjørt verður í teimum ymsu fyrstiflokkunum, vera sera ymiskt; tað eru næmingarnir í tí einstaka flokkinum, ið saman við lærarum sínum, koma ásamt um hvat, ið flokkurin skal arbeiða við. Í tvey ára fakunum kann ein flokkur t.d. gera nógv við tann skrivliga partin í fyrsta flokki og goyma annað til annan flokk ella øvugt.

Tað ber til at siga, at skipanin byggir á floks-samleika. Ja, at flokkurin er kjarnin í skipanini. Stórt arbeiði verður lagt í at fáa næmingarnar í tí einstaka flokkinum at taka júst sín flokk til sín, og nógv verður gjørt til tess at samansjóða flokkin. Nevnast kunnu floksveitslur, uttanlandsferð, felags átøk av ymsum slag o.s.fr.

Nú er ætlanin, at ein málsligur fyrstiflokkur skal syndrast og spjaðast út á teir fýra eftirverandi flokkarnar. Flokkurin, talan er um, telur 19 næmingar og verður av øllum, ið kenna hann, sagdur at vera óvanliga vælvirkandi (dugnalig, sosial).

So má ein spyrja, hví harraboð koma nú frá MMR at fækka teir 5 komandi málsligu 2. studentsflokkarnar niður í fýra? Svarið kann bert vera, at MMR hevur talt næmingarnar í øllum fimm flokkunum saman og síðani dividerað talið.

Men tað, at eingin flokkur skal hava fleiri enn 24 næmingar, merkir jú ikki, at tað skulu vera 24 næmingar í hvørjum flokki. Tað ber ikki til at definera ein flokk út frá einum ávísum tali. Tá ið ein flokkur, sum byrjaði við 23-24 næmingum, við endan á tí fyrsta árinum telur 19, so uppfyllir hann tó allar treytir fyri at vera ein flokkur.

Ovasti myndugleikin hevur jú avgjørt, at allir skikkaðir umsøkjarar skulu takast upp á Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Talið á skikkaðum umsøkjarum kann sjáldan dividerast við 24. Hetta merkir, at flokkarnir kunnu hava færri næmingar enn 24 frá byrjan, t.d. tí 16 lupu av. Hetta merkir væl ikki, at næmingar skulu finna seg í tilvildarligum avgerðum, ið gera teir verri fyri?

Í fjør hendi júst tað sama, nevniliga at ein flokkur varð spjaddur út á hinar flokkarnar. Næmingarnir mótmæltu, men til fánýtis.

Tað er væl ikki so, at MMR kalkulerar við at uppløysa ein flokk við endan á fyrsta skúlaári?

Í hesum ítøkiliga málinum er jú ikki talan um eina neyðstøðu, sum hvør maður má geva seg undir, tí flokkarnir vóru jú upptiknir at byrja í august 2002.

Tá pedagogiska atlitið verður offrað fyri at spara nakrar krónur, minkar álitið hjá næmingum og lærarum á skipanina, tí einki samsvar er ímillum tey yvirskipaðu málini og tað, ið verður gjørt í praksis.

Vit mótmæla tilvildarligari avtøku av flokki og heita á MMR um at taka avgerð sína aftur.






*Lars Høgh, sum hevur spælt 817 landskappingardystir við OB, skal taka sær av málmansvenjingini undan landsdystunum móti Íslandi og Týsklandi*

# Lars Høgh skal hjálpa landsliðnum

**Navnframi danski landsliðsmálverjin, Lars Høgh, skal virka sum málmansvenjari hjá A-landsliðnum uppundir dystirnar móti Íslandi og Týsklandi**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hetta er úrslitið av einum samstarvi millum FSF og Tryggingarfelagið Føroyar, sum fíggjar tiltakið.

Lars Høgh skal vera málmansvenjari hjá føroyska landsliðnum uppundir dystirnar móti Íslandi tann 7. juni og Týsklandi tann 11. juni. Hann skal skipa fyri venjingini, og hann fer at vera við til dystirnar.

Harumframt fáa allir málverjarnir í 1. deild hjá monnum og málverjar á ungdómslandsliðunum høvi at venja undir Lars Høgh. Hetta verður dagarnar aftaná dystin móti Íslandi.

## Royndur málverji

Lars Høgh er ein sera royndur málverji. Hann hevur leikt 817 landskappingardystir við besta liðnum hjá OB, og hann spældi sín fyrsta dyst á besta liðnum í 1977.

Hóast góðu evnini sum málverji hevur hann bert leikt átta landsdystir, tí hann altíð hevur staðið í skugganum av øðrum málverjum. Í 100 landsdystum hevur hann sitið á beinkinum.

Tríggjar ferðir eydnaðist tað honum at gerast danskur meistari við OB. Tað var í 1977, 1982 og 1989. Fleiri ferðir er hann kosin ársins málverji í Danmark. Hann gavst at spæla fótbólt í 2000.

Seinastu árini hevur hann verið málmansvenjari og ítróttarstjóri hjá OB. Harumframt hevur hann verið málmansvenjari hjá Sunderland í ensku Premier League, har danski landsliðsmálverjin Thomas Sørensen enn er málmaður.

## Tørvur á málmansvenjara

Dánjal Jákup Andreasen, formaður í FSF, sigur, at hann er sera fegin um, at landsliðið fær ein málmansvenjara uppundir hesar týdningarmiklu dystirnar.

– Tá vit spurdu Henrik Larsen, hvussu vit best kundu nýta peningin frá Tryggingarfelagnum, vísti hann á tørvin á einum málmansvenjara, og vit hava nú fingið einum av teimum bestu, sigur Dánjal Jákup Andreasen.

Jens Erik Magnussen frá FSF vísir á, at tað hevur verið ein stórur trupulleiki hjá landsliðnum, at tað ikki hevur havt ein veruligan málmansvenjara. Við hesi loysnini sleppa venjararnir at nýta alla sína orku til hinar leikararnar. Hetta fer at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá Henrik Larsen.

Avtalan millum FSF og Lars Høgh er tó bert galdandi fyri hesar báðar dystirnar.

## Góð íløga

Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum, sigur, at felagið gjarna vildi hjálpa føroyska landsliðnum at vera so væl fyri sum gjørligt uppundir kanska tann størsta dystin hjá liðnum nakrantíð.

– Hetta er ein tann størsta avbjóðingin hjá føroyska landsliðnum nakrantíð, tá týsku varaheimsmeistar-arnir koma á vitjan. Málmaðurin verður óivað ein lykla-leikari, tá tann týska maskinan kemur við fullari ferð, sigur Gunnar í Liða, sum er væl nøgdur við avtaluni við Lars Høgh.

Spurdur um hvat tað kostar at fáa hendavegin svarar Gunnar í Liða ikki beinleiðis, men leggur afturat at tað ikki er bíligt.



*Formaðurin í Fótbóltssambandinum Dánjal Jákup Andreasen, sum situr mitt í, og stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar, Gunnar í Liða, til vinstru, eru báðir fegnir um avtaluna, sum millum annað hevur við sær, at Lars Høgh kemur higar at venja føroyskar málmenn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Fíggjarpolitikkurin hjá samgonguni skyldina av at lønarkrøvini eru so stór

**– Tey næstu árini verður neyðugt at hækka skattin aftur, samstundis sum landskassin má taka lán, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur**

Búskapur
Áki Bertholdsen



*– Tað er nógv, sum bendir á, at landskassin fær ein stóran trupulleika tey næstu árini, heldur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur*

– Tað er fíggjarpolitikkurin, sum hevur størsta partin av skyldini fyri, at lønarkrøvini eru so høg, sum tey eru, nú samráðingar eru ímillum fakfeløgini og arbeiðsgevararnar

Tað ivast búskaparfrøðingurin, Magni Laksáfoss, ikki í.

Hann sigur, at vit kunnu spyrja okkum sjálvi, hvussu tað ber til, at fakfeløgini seta so stór krøv, sum tey gera.

– Tað er ikki bara tí, at fiskiskapurin hevur verið so góður og prísurin høgur. Tað, sum góður fiskiskapur og fiskaprísir hava gjørt, er, at teir lyftu okkum upp úr eini djúpari kreppu við ongum lønarvøkstri yvirhøvur til ein lønarvøkstur.

– Bæði fiskiskapurin og fiskaprísurin eru tvífaldaðar og sostatt er inntøkan av hesum báðum fýra ferðir størri nú, enn hon var fyri nøkrum árum síðani

Hetta setti gongd á aftur samfelagið á ein náturligan hátt, tí tað skapti ein eftirspurning

– Men tað, sum hevur lagt hetta ovurstóra trýstið á búskapin, sum nú er á honum, er tann førdi fíggjarpolitikkurin hjá samgonguni.

Magni Laksáfoss sigur, at upp á nøkur heilt fá ár hevur samgongan økt útreiðslurnar av at reka almennu tænasturnar eina heila milliard, úr einari milliard, upp í tvær milliardir.

– Hetta hevur lagt eitt øgiliga stórt trýst á arbeiðsmarknaðin, tí økingin í almennu útreiðslurnar kemur omaná økingina í fiskiskapinum og fiskaprísinum.

Magni Laksáfoss sigur, at trýstið á arbeiðsmarknaðin hesi seinastu árini skal eisini síggjast í ljósinum av, at vit hava innflutt nógva arbeiðsmegi seinastu árini.

– Fyri nøkrum árum síðani vóru vit 43.000 fólk í Føroyum, nú eru vit 48.000. Av hesum 5.000 fólkunum, sum eru komin afturat, eru kanska 2000 børn og onnur sum ikki arbeiða, men hini 3.000 eru fólk í arbeiðsførum aldri.

Arbeiðsstyrkin í Føroyum hevur verið 30.000 fólk og sostatt øktu vit arbeiðsstyrkina eini 10% eftir nøkrum heilt fáum árum.

– Tað, sum er hent hesi seinastu árini, er í fyrsta lagi, at vit hava útvegað arbeiðið til øll tey mongu, sum vóru arbeiðsleys í kreppuni, umframt til tey 3.000, sum eru komin afturat.

Sostatt hava vit beint fyri øllum arbeiðsloysinum og hava harafturat kunnað økt arbeiðsstyrkina eini 10%.

Magni Laksáfoss sigur, at í veruleikanum hava tey 3.000 fólkini, sum eru flutt til landið, verið við til at lætta trýstið á arbeiðsmarknaðin og hava sostatt eisini gjørt sítt til at halda lønunum niðri.

Hann sigur, at hetta er eitt talandi dømi um, hvussu ómetaliga stórt trýst liggur á arbeiðsmarknaðinum.

Og tí er tað eisini sjálvsagt, at lønarkrøvini økjast.

– Tað er heilt týðiligt, at tað er virksemið í landinum, sum leggur tryst á lønirnar og førir til økt lønarkrøv.

– Men tað er tann førdi fíggjarpoilitikkurin við øktum almennum útreiðslum, sum hevur skapt hetta trýstið og sum tískil eisini er tann beinleiðis orsøkin til lønarkrøvini, sum nú eru, sigur buskaparfrøðingurin.

## Neyðugt at hækka skattin

Magni Laksáfoss heldur sostatt eisini, at av tí, at tað er so stórur tørvur á arbeiðsmegi, kundu fakfeløgini ikki valt betri løtu at farið til samráðingar í felag og at kravt stórar lønarhækkingar.

– Men fyri samfelagsbúskapin er tað ikki heppið at økja lønarvøksturin so nógv nú, vit eru á aldukambinum.

– So vil tíðin vísa, um vit vit kunnu koma enn longur upp á aldukambin. Men tað dugi eg ikki at ímynda mær, tí útlitini eru onki serligt, hvørki fyri fiskiskapinum, fiskaprísinum ella alivinnuni.

Tað skilst eisini á búskaparfrøðinginum, at hann ivast eitt sindur um framtíðina.

– Nú tosar samgongan um at tátta í komandi ár, tí fíggjarlógin fyri 2004 skal skerjast eitt sindur afturímóti fíggjarlógini í ár.

– Eg haldi, at tað er eitt sindur undarligt, at hava so stóra almenna nýtslu í teimum góðum tíðunum, sum vit hava havt seinastu árini, og so at tosa um at tátta í, nú tíðirnar eru við at venda aftur.

Magni Laksáfoss sigur, at tað var nú, at tað almenna skuldi átt pening at slúsa út í samfelagið fyri at hildið virkseminum uppi.

Men hann er eisini greiður yvir, at vit eru ikki á veg í eina kreppu, sum á nakran hátt líkist henni, sum vit vóru í fyri nøkrum árum síðani.

– Tá ið kreppan var í nítiárunum, høvdu kommunurnar lánt seg út á sjógv, samstundis sum bæði vinnan og bankarnir vóru út av lagi illa fyri.

– Sostatt er støðan nú tann beint øvugta av tí, hon var í nítiárunum, tí tá fóru bæði kommunur, vinnulív og bankar á húsagang og landskassin, sum onki skyldaði, mátti átaka sær stóra skuld fyri at bjarga teimum.

Nú eru bæði kommunur, vinnan og bankarnir væl fyri. Men hinvegin hevur Landskassin einar fýra milliardir í skuld og tað, sum landskassin eigur í landsbankanum, er í stóran mun bundið og kann ikki brúkast.

– Sostatt er nógv, sum bendir á, at landskassin fær ein stóran trupulleika tey næstu árini. Verður gongdin komandu árini, sum hon hevur verið tey seinnu árini, verða fleiri og fleiri málsøki flutt yvir á kommunurnar at umsita fyri at lætta um hjá landskassanum, tí kommunurnar hava ráð til tað.

– Í nítiárunum bar til hjá landskassanum at halda uppat við øllum útbyggingum, samstundis sum allur studningur varð tikin av fyri at spara pening.

Men hendan reseptin nyttar onki í dag, tí nú er ongin studningur at taka og almennu útbyggingirnar eru so smáar, at har er heldur onki at spara.

– Sostatt stava allar samfelags útreiðslurnar frá vanligum rakstri og tí er eisini rættiliga trupult at skerja tær.

Magni Laksáfoss sigur, at samgongan hevur víst seg ikki at hava rygg til at skerja útreiðslurnar. Tí er einasti máti at fáa tað at ganga upp hjá landskassanum, at flyta enn fleiri málsøki yvir á kommunurnar - og at hækka skattin.

Hann heldur, at politiskt er tað trupult at tosa um skattahækkingar nú, skatturin akkurát er lækkaður.

– Tí verður landsbankin uttan iva tømdur fyrst. Men tað er skjótt gjørt og um eini tvey ár er tað uppi og tá verður eisini neyðugt hjá landskassanum at taka lán, sigur Magni Laksáfoss.

*framhald av síðu 4*

– Tí haldi eg, at lønarkrøvini, sum nú eru sett fram, eru ein heilt natúrlig avleiðing av støðuni á arbeiðsmarknaðinum beint nú, sigur Magni Laksáfoss.

## Onga ávirkan á inflatiónina

Magni Lakáfoss er heldur ikki samdur í, at størri løn, førir til hægri inflatión, tvs, prísvøkstur.

– Vit innflyta næstan allar okkara vørur og tí verður inflatiónin eisini skapt uttanlands. Tað, sum avgerð prísstøðið í Føroyum, er gongdin í oljuprísinum og matvøruprísinum uttanlands, sum vit als onga ávirkan hava ár.

– Sostatt hava vit at kalla onga ávirkan á inflatiónina í Føroyum

– Tí er als onki hald í tí, tá ið sagt verður, at tað nyttar onki at geva hægri løn í Føroyum, tí alt verður etið upp aftur av hækkandi prísum.

Magni Laksáfoss sigur, at hetta er ein góð mynd í stórum samfeløgum, sum USA, Týsklandi og Bretlandi, sum ikki hava so stóran innflutning, men sum framleiða tað mesta av vøruni sjálvi.

– Hinvegin skapar lønarvøkstur í Føroyum inflatión í útflutningsprísinum, tí tá ið lønin økist, verður vøran, sum vit skulu útflyta, dýrari at framleiða.

– Men prísurin á útflutningi kann ikki trýstast upp, tí tað er marknaðurin, sum vit selja til, ið avger prísin. Tí førir lønarvøkstur til trupulleikar í útflutningsvinnuni og tað gongur útyvir kappingarførið, sigur Magni Laksáfoss.

– Tað er onki undarligt í hesum her, tí hetta er púra vanlig búskaparfrøði, leggur hann afturat.

Hann heldur, at lønarvøkstur fer serliga at raka fiskavirkini og at seta tey undir trýst, tí tey fara at fáa hægri útreiðslur.

– Hinvegin hava tey yvirskot nú, so tey verða ikki trýst líka hart av eini lønarhækking nú, sum tey blivu í áttatiárunum, táið tey øll høvdu ovurstór hall at dragast við.

– Og at tosa um at landið fer at kollsigla fyri tað um lønirnar hækka, heldur hann er heilt burturvið.

Hinvegin heldur hann, at tað er lítið høpi í, at samanbera lønarkrøvini í Føroyum við lønarkrøvini í øðrum londum og at brúka tað sum prógv fyri, hvussu órímilig lønarkrøvini hjá arbeiðarafeløgunum eru í Føroyum afturímóti lønarkrøvum í øðrum londum.

– Støðan á arbeiðsmarknaðinum í Føroyum kann als ikki samanberast við grannalond okkara. Í Týsklandi eru lønarkrøvini avmarkað, men har er stórt arbeiðsloyvi. Tað ber heldur ikki til at samanbera okkara viðurskifti við Grønland, har eisini arbeiðsloysi er og har viðurskiftini eru heilt onnur, eins og arbeiðsloysið eisini veksur í Danmark og í USA, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur.